# Teitur virðisløntur í Danmark



*Danir hava rættiliga fingið eygað á føroyska tónleikaran Teitur Lassen, og sunnudagin fekk hann tónleikavirðisløn í Rødovre*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Rødovre Musikpris 2004 varð sunnudagin latin føroyska tónleikaranum Teiti Lassen. Virðislønin er upp á 50.000 krónur og verður latin sum viðurkenning og eggjan til at halda fram**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Nú hevur føroyski tónleikarin Teitur Lassen fingið eina tónleikavirðisløn í útlondum.

Tað er árliga tónleikavirðislønin hjá Rødovre Kommune og Rødovre Center í Danmark, sum verður latin føroyska sangaranum.

Sunnukvøldið var síðbundna nýggjárskonsertin í mentanarhúsinum Viften í Rødovre, og har varð virðislønin latin Teiti. Umframt heiður og viðurkenningina fylgja eisini 50.000 krónur við.

Í grundgevingini fyri at lata Teiti virðislønina verður sagt, at Teitur verður mettur sum ein komet á altjóða stjørnuhimmalinum. Hann hevur fingið sáttmála við Universal Records, hevur givið fløgu út og hevur spælt 150 konsertir higartil í ár.

Dómsnevndin sigur, at lýsingarherferðir og glansur hevur ongan áhuga hjá Teiti. Hjá honum snýr tað seg um tónleikin.

## Viðurkenning

Tað eru Rødovre Kommune og Rødovre Centrum, som í felag lata Ársins Tónleikavirðisløn. Hetta er gjørt 10 ferðir áður, og millum nøvnini, sum hava fingið hesa virðisløn, eru heimsfiólspælarin Nikolaj Znaider, trompetspælarin Maja Markert og duoin Haugaard og Høirup.

Í dómsnevndini, sum ger av, hvør skal fáa virðislønina, sita Erik Larsen, borgarstjóri í Rødovre, Alex Larsen, stjóri fyri Rødovre Center, og Alex Nyborg Madsen, tónleikari og fjølmiðlamaður.

Endamálið við Rødovre Musikpris er at geva einum tónleikara ella bólki eina peningaupphædd sum viðurkenning, og virðislønin skal eisini metast sum ein eggjan til at halda fram við menningini innan tónleikin.


J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.com

NÝGGJA FERÐAÆTLANIN HJÁ NORRÖNU

Eftir 10. januar 2004 sær vetrarferðaætlanin hjá Norrönu soleiðis út:

| Havn | Dagur | Koma | Fráferð | Januar | | | | Februar | | | | Mars | | | | Apríl | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hanstholm | Leygardag | 11.00 | 16.00 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | 28 | 06 | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 |
| Bergen | Sunnudag | 06.00 | 06.30 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 07 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | - |
| Lerwick | Sunnudag | 16.30 | 17.00 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 07 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | - |
| Tórshavn | Mánadag | 06.00 | 17.00 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 05 | 12 | 19 | - |
| Seyðisfjörður | Týsdag | 09.00 | - | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 | 02 | 09 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | - |
| Seyðisfjörður | Mikudag | - | 18.00 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | 25 | 03 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | - |
| Tórshavn | Hósdag | 13.00 | 20.30 | 15 | 22 | 29 | 05 | 12 | 19 | 26 | 04 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | - |
| Lerwick | Fríggjadag | 08.30 | 09.00 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | 27 | 05 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | - |
| Bergen | Fríggjadag | 21.00 | 21.30 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | 27 | 05 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | - |



1 vika í Danland-íbúð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili

Danland er vorðið eitt hitt best umtókta ferðamálið hjá føroyingum, og ikki er tað heldur so løgið.

Danland frítíðardeplarnir hava vælinnrættaðar íbúðir við køki og nógv frítíðartilboð eru fyri bæði vaksin og børn.

Sí annars heimasíðuna www.danland.dk.

Januar - mars
1 vika í Danlandi 5.995,-

Íroknað er: ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innv. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku. Í Hirtshals, Blokhus ella Ebeltoft í tíðarskeiðinum 01.01.04-27.03.04





Hví ikki fara ein túr til Danland á páskum?

April 2004
1 vika í Danlandi 6.995,-

Íroknað er: ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innv. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku. Í Hirtshals, Blokhus ella Ebeltoft í tíðarskeiðinum 01.04.04-15.04.04



Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 til Danmarkar og aftur
2 fyri 1 til Hanstholm 2.990,-
Ferðist tvey í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað á leiðini Tórshavn-Hanstholm og aftur og gjaldið fyri ein.
Aðrir prísir eru galdandi í apríl

Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 til Noregs og aftur
2 fyri 1 til Bergen 2.380,-
Ferðist tvey í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað á leiðini Tórshavn-Bergen og aftur og gjaldið fyri ein.

Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 til Hetlands og aftur
2 fyri 1 til Lerwick 1.790,-
Ferðist tvey í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað á leiðini Tórshavn-Lerwick og aftur og gjaldið fyri ein.

Ferðist 2 og gjaldið fyri 1 til Íslands og aftur
2 fyri 1 til Seyðisfjörð 2.200,-
Ferðist tvey í innv. 2-koyggjukamari við wc/bað á leiðini Tórshavn-Seyðisfjörður og aftur og gjaldið fyri ein.

Barnavinarlig Noregsferð

1 vika á Pers Hotel - 2 vaksin, 2 børn og bilur

Pers Hotel er ein av teimum fáu frítíðardeplunum í Noregi, ið hava baðiland. Depilin við bæði smáttum og íbúðum liggur í tí avbera vakra Gol-økinum. Sera barnavinarligt við einum hópi av frítíðarmøguleikum. Koyritíðin frá Bergen er einar 4-5 tímar.





1 vika á Pers úr 6.000,-

Íroknað er: Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari innv. við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost og 2 gistingar í Bergen á út- og heimferðini.

1 vika í summarhúsi í Easterhoull í Hetlandi

1 vika úr 4.500,-

Íroknað ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur

4 fólk í bili til Geilo

6 tímar at koyra til/frá Bergen

Í samband við at vit sigla til Noregs allan veturin, fara vit at bjóða ferðandi framúr góð tilboð um skíferðir til Noregs.



Skíðferð til Noregs fyri 4 fólk í bili við uppihaldi

1 vika í Geilo 11.600,-

Íroknað ferð fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari v. wc/bað innv., yvirnátting 7 nætur í íbúð á Geilo Apartment í Geilo og 2 nætur í Bergen á út- og heimferð.

SMYRIL LINE




# Teldutrygdin er stórur trupulleiki

**– Vantandi kt-trygd er ein hóttan móti teimum fyrimunum, sum samfelagið kann fáa við øktari talgilding, sigur KT-Forum í áliti, sum í næstum verður latið aðalstjórunum at taka støðu til. Landsgrannskoðarin hevur í fleiri ár eftirlýst trygd og samstarvi hjá tí almenna um teldur og telduskipanir**

TELDUTRYGD
*Eyðun Klakstein*

Landsgrannskoðarin, sum heldur eitt vakið eyga við landsins umsiting, hevur seinastu árini havt harðan og afturvendandi kritikk av teldutrygdini hjá tí almenna.

Leivur Harryson staðfestir enn einaferð í seinastu frágreiðing síni til løgtingsgrannskoðararnar, sum kom í fjør, at almenni kt-politikkurin er eitt vandamál.

– Í landsumsitingini fer arbeiðið at tryggja tann elektroniska partin av kunningarkervinum fram óskipað. Fólk sita og stríðast við somu trupulleikar uttan at halda seg til viðurkendar standardir. Hetta kann lættliga fáa sera óhepnar fylgjur, og vandi er fyri, at peningur og starvsfólkaorka ikki verða nýtt á skynsaman hátt, skrivar Landsgrannskoðarin í frágreiðing síni.

Hann heitti í 2001 á løgmann um at gera nakað við støðuna og at fáa í lag ein samskipaðan almennan politikk um stóru nýtsluna av teldum, telduútbúnaði og telduskipanum.

Bæði formaðurin í KT-Forum og fulltrúðin á Dátueftirlitinum søgdu við Sosialin í gjár, at meðan nýtslan av teldum og telduskipanum var eksploderað seinastu árini, høvdu trygdin og trygdarskipanir ikki fylgt við í sama mun.

## KT-Forum fekk uppgávuna

Løgmaður ásannaði í skrivi í oktober 2001, at eingin felags kunningar- ella trygdarpolitikkur var hjá landinum, og hann helt, at landsstýrismaðurin við vinnumálum hevði ábyrgdina av at fáa hetta í rættlag.

Nakrar mánaðir seinni setti Vinnumálaráðið gongd á arbeiðið at orða politikk fyri kunningar tøkni og kt-trygd, og hetta varð álagt KT-Forum at gera. Í hesum forumi eru umboð fyri øll aðalráðini hjá landinum.

KT-Forum hevur síðani arbeitt við at gera uppskot um almennan kt-politikk, og nú er hetta arbeiði liðugt. Seinni í hesum mánaðinum verur álitið hjá KT-Forum lagt fyri aðalstjórarnar at taka støðu til.

Í fjørsummar sendi KT-Forum uppskotið hjá sær út til hoyringar, og í hesum uppskoti, sum ikki er endaliga álitið, men tað er lítið broytt, nú tað skal leggjast fyri aðalstjórarnar, verður skotið upp, hvør almenni kt-politikkurin skal verða.



*Lykil til størri føroyska teldutrygd er ein felags standardur. KT-Forum, sum hevur gjørt uppskot um almennan kt-politikki, vil hava mest nýtta standardin í útlondum at verða grundarlagi undir føroyska poltikkinum eisini*

## Vantandi kt-trygd ein hóttan

KT-Forum ger í álitinum hjá sær greitt, at støðugt vaksandi kt-nýtslan hjá almennu stovnunum ger, at tað almenna í dag stuðlar sítt virksemi fullkomiliga á teldur og telduskipanir.

– Vantandi kt-trygd er ein hóttan móti teimum fyrimunum, sum samfelagið kann fáa við øktari talgilding. Arbeiðið við kt-trygd skal tí eisini síggjast sum ein roynd at skapa grundarlag undir meira framkomnari nýtslu av kunningartøkni. Tamarhald fæst einans við at fyrihalda seg til trygdina, áðrenn skaðin er hendur, sigur KT-Forum, sum fer at mæla til, at ein nýggjur standardur verður brúktur fyri kt-útbúnaðin hjá landinum.

Fleiri slíkir standardir finnast, men KT-Forum heldur, at tann mest nýtti av teimum eisini skal nýtast í Føroyum. Tað er ein standardur, sum verður róptur ISO 17799.

Ein fyrimunur við hesum standardi er, at hann ger mun á stovnum, sum hava brúk fyri lættari loysnum og teimum, sum skulu hava fullan standard fyri at verja eymar og privatar upplýsingar um fólk.

## Nýggj kt-deild

KT-Forum mælir til at til at stovna eina nýggja kt-deild undir Vinnumálaráðnum, sum skal samskipa kunningartøknina hjá landsfyrisitingini og at fáa trygdina í rættlag.

– Tað er ikki yvir at dylja, at verksetanin av regluverkinum verður ein stór og tung uppgáva hjá fyrisitingini, og sum er hevur fyrisitingin av góðum grundum ikki nóg góðan førleika at byggja upp og at seta í verk kt-trygdarkervi sambært standardunum. Onkur stovnur er tó byrjaður, skrivar KT-Forum í sínum áliti.

Ein trupulleiki við at gera nýggja skipan fyri fyrisitingina er, at møguleikin at útvega ráðgeving í Føroyum er avmarkaður.

– Nakrir privatir ráðgevar hava góðar royndir við at byggja upp leiðsluskipanir til stýring av góðsku (ISO 9001 góðskukervi) og aðrar líknandi skipanir, men tó at skipanirnar líkjast, so brýtur leiðsla av kt-trygd so mikið frá, at ráðgevar mugu dagføra seg væl og virðiliga á hesum økinum. Útlendsk ráðgeving er sera kostnaðarmikil.

Um nógvir ella allir stovnar fara í holt við at byggja trygdarkervir upp samstundis uttan skikkaða ráðgeving, er vandi fyri at nógv arbeiðsorka verður spilt, og at skipanirnar ikki koma at virka nóg væl.

KT-Forum mælir tí til, at fimm pilotprojekt verða sett í gongd sum skjótast, sum skulu geva landinum neyðugu royndirnar at gera felags kt-skipan og trygd. Aðrir stovnar skulu samstundis arbeiða við trygdin, men við minni ferð.

Men áðrenn nakað kann gerast við landsins kt-trygd, skulu aðalstjórarnir í landsfyrisitingini kunnast um uppskotið frá KT-Forum, og teir skulu eisini taka undir við tí.

## Standardur skal týðast

TÝÐING
*Eyðun Klakstein*

KT-Forum mælir til at ISO 17799 standardurin verður brúktur sum grundarlag undir kt-trygdini hjá landinum.

Upprunamáli í hesum standardi er enskt, men tað dugir ikki.

Standardurin er eisini týddur til eitt nú danskt og norskt, men tað er heldur ikki nóg gott.

KT-forum heldur tað vera umráðandi, at føroyingar fáa felags heiti fyri ymisku hugtøkunum viðvíkjandi kt-trygd.

– Fara vit at brúka ymiskar útlendskar standardar verða heitini óumberiliga fløkt saman.

KT-Forum mælir tí til at umseta standardin, og stig eru tikin til at útvega rættindini til at umseta og geva hann út á føroyskum.

– Standardurin verður endurskoðaður, og nýggj útgáva kann væntast seint í 2004. Sum skilst verður bygnaðurin í standardinum broyttur munandi. Samanumtikið talar hetta fyri ikki at umseta verandi útgávuna, men at bíða eftir komandi útgávu, heldur KT-Forum.

Sum fyribils loysn verður í staðin arbeitt við at gera ein orðalista við mest vanligu hugtøkunum.